betri trygging

November 2022

# Djóratrygging – Hundur

*Skjal við upplýsingum um tryggingina*

Henda kunningin veitir ikki allar upplýsingar um djóratryggingina. Tá skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Umframt lógarkravdu ábyrgdartryggingina fyri hundar, kann djóratryggingin bæði fevna um eina djóralívstrygging og eina djórasjúkutrygging. Tú velur tær tryggingarnar, sum svara best til tín tørv. Umframt hesar tryggingar skulu allir hundar hava lógarkravdu ábyrgdartryggingina.

### Hvat dekkar tryggingin?

Djóratryggingin er í tveimum. Tú kanst velja eina Djóralívstrygging og eina Djórasjúkutrygging um hundurin er yngri enn 6 ár.

**Djóralívstryggingin fevnir um:**

- ✓ Tá hundurin doyr av sjúku
- ✓ Tá hundurin doyr av vanlukkutilburði
- ✓ Hundurin verður skaddur undir flutningi í Føroyum
- ✓ Um djóralækni metir, at hundurin má avlívast
- ✓ Um hundurin hvørvur og er burtur í meira enn 3 mánaðir

**Djórasjúkutryggingin fevnir um:**

- ✓ Tá hundurin verður yvirkoyrdur
- ✓ Beinbrot
- ✓ Krossband- og meniskskaðar
- ✓ Knæskel, sum fer úr lið
- ✓ Tannskaðar
- ✓ Skaðar av álopi frá øðrum hundum
- ✓ Keisaraskurð
- ✓ Skurð í sambandi við lívmóðurbruna
- ✓ Skurð fyri bróstkrabba
- ✓ Skurð fyri bløðrustein
- ✓ Skurð fyri svullir
- ✓ Viðgerð av eygnalokum (entropion og extropion)
- ✓ Viðgerð fyri ”cherry eye”
- ✓ Amputatión av eyga
- ✓ Heilivág, sum verður latin á staðnum

### Hvat dekkar tryggingin ikki?

Her eru nøkur dømi um tað, sum djóratryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- x Sjúkur og skaðar, sum ikki eru nevnd í tryggingartreytunum
- x Fyribyrgjandi viðgerðir
- x Skaðar ella vanlukkutilburðir, sum ikki eru brádliga íkomnir
- x Hundar, sum ikki eru lógligir sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (hfs.fo)
- x Tá brot er framt á almennar forskriftir og leiðbeiningar frá djóralækna
- x Skaðin er orsakaður av grovum ósketni hjá eigara, ella at hundurin kom ov seint undir djóralæknahond

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Endurgjaldið fyri djóralív minkar, so hvørt hundurin eldist
- ! Tryggingin fer úr gildi, tá hundurin er 11 ár
- ! Tryggingin fevnir í mesta lagi um 3 skaðar um árið
- ! Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 10.000 fyri hvønn skaða
- ! Endurgjaldið er 50%, tá hundurin hvørvur og er burtur í meira enn 3 mánaðir

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo

## Sjálvsábyrgd

Sjálvábyrgdin er kr. 1.000.

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar allastaðni í Føroyum og á ferðum uttanlands í upp til 3 mánaðir. Tó dekkar hon ikki undir sjóvegis flutningi millum lond. Djórasjúkutryggingin fevnir einans um viðgerðir hjá djóralækna í Føroyum.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella um kundaskipanina "Mín Trygging"
- Er hundurin skaddur ella sjúkur, skal djóralækni kanna hann skjótast gjørligt og møgulig viðgerð skal fremjast beinanvegin
- Er talan um stuldur, skal løgreglan á staðnum fráboðast.
- Skal hundurin avlívast, skal avlívingin verða framd av ella undir eftirlitið av útbúnum djóralækna
- Send okkum skjalprógv frá djóralækna, fyri viðgerð ella avlíving, skjótast gjørligt

**Tá ið broytingar eru**

- Tú skalt boða okkum frá, tá ið tú flytir bústað
- Skiftir hundurin eigara, skulu vit hava boð um tað beinanvegin

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga.
Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir, at ein skaði er útgoldin ella avvístur.

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo